

# formula

## Samfelagstilvit 2025

## Góðu lesarar, samstarvsfelagar og starvsfólk

Í Formula hava vit altíð havt eina greiða hugsan: Vit skulu skapa álítandi KT-loysnir, sum gera samfelagið tryggari og kundarnar sterkari. Hetta er kjarnin í okkara virksemi, og tað er eisini kjarnin í okkara ábyrgd.

Burðardygd og ábyrgd hava altíð verið ein náttúrligur partur av okkara arbeiði. Vit arbeiða skipað og miðvíst við at menna orkuskynsamar og álítandi KT-loysnir, sum stuðla einum tryggum og haldførum samfelagi.

Vit vita, at KT er ryggurin í einum nútímans samfelagi. Tað merkir eisini, at vit hava eina serliga ábyrgd. Tá vit tryggja dátur, verja brúkarar og menna KT-loysnir, sum spara orku og tíð, so eru vit ein virkin partur av eini størri heild – sum virkar fyri einum grønari, tryggari og betri samfelagi.

Henda frágreiðingin vísir nøkur av teimum stigum, vit longu hava tikið, og tær ætlanir, vit hava fyri framtíðina. Hon snýr seg ikki bara um tøl og mátitøl, men um virði, menniskju og ein felags visjón:

**At spæla okkara kundar betri – og samstundis gera samfelagið tryggari og burðardyggari.**

Vit vita, at hetta er byrjanin. Men hvørt stig hevur týdning, og hvørt stig verður tikið við ábyrgd.

Tí vit vilja, at tøkni skal tæna menniskjum – ikki øvugt.

*Takk fyri, at tú vilt vera við á hesi ferðini.*



# Fróði Magnussen

Stjóri – Formula

# Formula í stuttum

Formula varð stovnað í 1986

Vit hava í dag kontór í:
- Tórshavn
- Runavík
- Klaksvík
- Keypmannahavn

Men eru til staðar í øllum landinum.

Starvsfólk í fyritøkuni eiga 67% og Føroya Tele 33% av Formula.

Formula selur fyri eitt tvey sifra milliióna tal á danska marknaðinum, umvegis okkara dótturfelag Formula IT Aps, og vit vinna støðugt marknaðarpart.

Hetta kemur eisini okkara føroysku kundum til góðar.

**Miðal Starvsaldur**

12 ár

**Starvsfólk**

107

**Eginogn og eginfígging**

40.000.000 og 40%



**SØLA (2024)**

199.000.000

# Hvat merkja heimsmálini fyri okkum?

**Tryggja reint vatn og reinførisviðurskifti**

Formula stuðlar kommunum at veita ein tryggan og haldføran rakstur av vatn- og reinsiverkum gjøgnum álítandi KT-loysnir. Vit hjálpa til at verja hesi týdningarmiklu skipanir móti teldusníkum og netálopum, so vatnverk og reinsiverk kunnu virka uttan avbrot.

**Gløgg orku nýtsla**

Formula strembar eftir at nýta orkuskynsamar KT-loysnir, serliga í okkara hýsingartænastu. Spillorkan frá ambætararúminum verður endurnýtt til at hita høvuðsskrivstovuna hjá Føroya Tele. Soleiðis gera vit KT-raksturin burðardyggari.

**Fremja varandi, burðardyggan búskap og tryggja góð størv í Føroyum**

Starvsfólkini eru hjartað í Formula. Vit leggja dent á trivnað, javnstøðu, fakliga menning og møguleikar til vøkstur. Vit menna KT-talent í Føroyum, bjóða ungum og royndum serfrøðingum at luttaka í framtíðar samfelagsmenningini, og vit byggja eitt gott arbeiðspláss, sum mennir føroyskt KT í Føroyum.

**Byggja sterk undirstøðukervi og fremja nýhugsan**

Formula byggir KT-infrastruktur, sum er grundarlagið undir føroyska samfelagnum – frá netverkstøkni og hýsing til KT-trygd og menning. Vit menna nýskapandi og álítandi loysnir, sum gera Føroyar meira talgildar, liviligar og mótstøðuførar.

**Tryggja burðardygga nýtslu og framleiðslu**

Vit velja veitarar og KT-útgerð við langari livitíð, og arbeiða við endurnýtslu og orkuskynsemi í allari framleiðslu- og rakstrarketuni. Okkara mál er at minka spill, tryggja gagnnýtslu og taka ábyrgd fyri hvørjari loysn, vit veita kundum.

**Byggja álítandi og tryggar stovnar**

Álit og trygd eru kjarnan í okkara arbeiði. Vit verja dátur og KT-skipanir hjá kundum og stovnum móti teldusníkum og óheimilaðari atgongd. Við álítandi KT-loysnum hjálpa vit at styrkja kommunur, myndugleikar og stovnar og stuðla einum rættvísum og tryggum samfelag.

# Vit gera mun í veruleikanum

Útvald ítøkilig dømi



## Vit veita møguleikar til øll

Vit samstarva við Almannaverkið og bjóða arbeiðsroyndir til fólk, sum hava tørv á einum tryggum byrjanarstaði. Soleiðis fáa fleiri møguleika at menna seg og gerast partur av arbeiðslívinum.

## Vit hjálpa og kveikja ungdómin

Vit bjóða lesandi starvsvenjing og veita lærarar til lærustovnar, so næmingar og lesandi kunnu menna førleikar innan KT. Og kunnu skriva uppgávur saman við okkum.

## Vit hugsa um umhvørvið

Vit endurnýta tómar tónaraprentarar og KT-útgerð, og tryggja, at alt verður sent til endurnýtslu. Vit velja veitarar, sum leggja dent á grønar loysnir – og vit stremba eftir at minka spill í okkara egna rakstri.



## Burðardygg hýsing við eini gløggari orkuloysn

Hýsingartænastan hjá Formula er okkara mest orkukrevjandi veiting. Hetta er ein týðandi partur av okkara fyritøku, og hýsingin eru samstundis eitt dømi um, hvussu burðardygg tøkni kann skapa virði fyri bæði kundar og samfelag.

Orkukeldan til okkara ambætararúm er fjarhiti frá brennistøðini, har spillorkan frá brenning verður gagnnýtt til framleiðslu av hita. Hetta ger, at el-nýtslan verður munandi minni, og at vit brúka orku, sum annars hevði farið fyri skeytið.

Upp á sama máta verður spillorkan, sum stendst av ambætara rakstrinum, eisini sjálv endurnýtt á gagnligan hátt:
Spillorkan, sum hýsingin framleiðir, verður endurnýtt til at hita høvuðsskrivstovuna hjá Føroya Tele, soleiðis at tey brúka munandi minni olju.

Soleiðis bjóða vit effektivan, tryggan og burðardyggan KT rakstur – eitt dygdargott dømi um, hvussu tøkni og umhvørvi kunnu ganga hond í hond.

## Formula ferðast kring landið við tilvitskuskeiðum um nettrygd

Í 2024 og 2025 hava vit skipað fyri **tilvitskuskeiðum um nettrygd** runt um í øllum landinum. Endamálið er at styrkja vitanina hjá bæði einstaklingum og arbeiðsplássum um, hvussu vit verja okkum móti hóttanum á netinum.

Hetta fyri at stuðla Nettrygdarætlanini hjá Føroya Landstýri, við at veita kunning og frálæru til borgarar og arbeiðspláss um tryggan atburð á netinum.



MÁL 8

MENNA HUGBURÐIN TIL NETTRYGD

**Tilvitið um at netálop henda, og at vit við rættari atferð kunnu fyribyrgja og avmarka skaðar, er í longdini besta trygdaramboðið, vit hava. Tilvitið um týdningin, ið net- og kt-trygd hava, má tí styrkjast.**

Ein týðandi táttur til tess at menna ein munagóðan kt-trygdarhugburð er tilvitanin um, at álop henda, ið kunnu hava álvarsamar menniskjaligar, búskaparligar og persónligar avleiðingar. Vit kunnu sjálv gera nógv fyri at avmarka skaðan, og tað skal tí vera natúrligt hjá øllum at seta kt-trygd í hásæti.

Fyri at menna ein góðan trygdarhugburð, skulu øll gerast vitandi um tryggan atburð og gerast før fyri at taka rættar avgerðir í kt- trygdarhøpi.

Ein serlig ábyrgd av at ganga á odda og vísa fyrimyndarligan trygdaratburð liggur á teimum, sum taka avgerðir.

ÁTØK

19 Skipa kunning og frálæru til børn, borgarar og arbeiðspláss um tryggan atburð á netinum.

20 Seta í verk frálæru, ætlað politikarum, myndugleikum, leiðslum og nevndum.

ÁBYRGD

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Gjaldstovan, Uttanríkis- og vinnumálaráðið, umframt samstarv við privatu og kommunalu geirarnar.

TÍÐARÆTLAN

2024-2026










## Formula – Samfelagslig ábyrgd og burðardygg menning
## Vit skapa virði í javnvág við samfelagið (1/2)

Vit á Formula eru tilvitað um okkara ábyrgd sum eitt virki í hjartanum av føroyska samfelagnum. Okkara leiklutur er ikki bert at skapa fíggjarlig úrslit, men at gera tað á ein hátt, ið styrkir samfelagið, mennir menniskju og verjir umhvørvið. Vit arbeiða fyri jaligum árinum á samfelagið, har langskygd strategisk menning og burðardygd hava størri týdning enn stuttskygdur fíggjarligur vinningur.

**Umhvørvi – ábyrgd og nýhugsan**

Vit velja veitarar, ið hava somu hugsan sum vit um burðardygd. Vit velja veitarar, ið endurvinna meginpartin av allari gamlari KT-útgerð. Í samstarvi við okkara veitarar savna vit brúkta útgerð, eykalutir og tónarapatrónir inn, ið síðani verða send til endurnýtslu og framleiðslu aftur.

Tá vit velja útgerð til loysnir hjá kundum okkara, leggja vit dent á orkunýtslu og lítla umhvørvisávirkan. Soleiðis tryggja vit, at okkara tænastur ikki bara eru dygdargóðar, men eisini grønari og burðardyggari.

**Endurnýttar og $CO_2$-neutralar teldur**

Formula er fyrsta føroyska KT-fyritøkan, ið kann bjóða góðkendar $CO_2$-neutralar og endurframleiddar teldur. Í Evropa verða yvir 160.000 farteldur beindar burtur hvønn dag – og í Føroyum umleið 500 um árið. Hetta er óneyðugt, tí meir enn 70% av íløgunum kunnu endurnýtast.

Teldurnar, ið vit bjóða, eru endurframleiddar frá framleiðaranum Circular Computing og hava umleið 97% av góðskuni hjá nýggjum teldu. Fyri hvørja endurnýtta teldu, verða plantað 5 trø, sum partur av eini altjóða træplanta-skipan.

**Samfelagið – menniskju í miðdepilin**

Vit eru sannførd um, at sosial ábyrgd er líka týdningarmikil sum fíggjarlig. Vit hjálpa og kveikja menniskju, ið ikki hava fingið allar møguleikar frá byrjan.

Vit hava samstarvað við Almannaverkið um praktikk og uppvenjing hjá fólki, ið hava tørv á arbeiðsroyndum og endurútbúgving. Vit taka lesandi frá Setrinum og føroysk lesandi uttanlands í starvsvenjing og bjóða teimum at skriva bachelor- og masterverkætlanir í samstarvi við okkum. Vit samstarva við fólkaskúlar og miðnámsskúlar, soleiðis at næmingar fáa innlit í KT-vinnuna og royndir við veruligum arbeiði.

## Formula CSR – Samfelagslig ábyrgd og burðardygg menning
## Vit skapa virði í javnvág við samfelagið (2/2)

**Stýring og leiðsla – trygd, virðing og álit**
Burðardygg stýring (Governance) er hornasteinurin í okkara arbeiði. Vit leggja okkum eftir, at mannarættindi, dátuvernd og arbeiðsrættindi verða hildin í øllum okkara sambondum – bæði innanhýsis og uttanhýsis.

Dátuvernd og KT-trygd: Vit verja kundadátur móti vandum á netinum við góðkendum ISO-standardum, trygdar- og eftirlitsskipanum.

Mannarættindi: Vit samstarva við veitarar, ið fylgja altjóða standardum, m.a. viðvíkjandi arbeiðsumstøðum og útvinning av ráevnum.

Starvsfólkatrivnaður: Vit eru partur av skipanum fyri fakliga skipað arbeiði. Formula er limur í Føroyar Arbeiðsgevarafelag og heldur allar sáttmálar, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag ger.

**Burðardygd – heildarhugsan fyri framtíðina**
Burðardygdin hjá Formula er meira enn $CO_2$-sparing og grønur roknskap. Hugsanin verður um eina heildarmynd, har vit taka hædd fyri:
- Umhvørvinum: lítil orkunýtsla, endurnýtsla og ábyrgd í innkeypi
- Samfelagnum: rættindi, javnrættur og útbúgving
- Fíggjarligum støðufesti: varandi menning, effektiv nýtsla av tilfeingi og ein sjálvberandi búskap.

**Okkara missión – ein grønari og rættvísari KT-heimur**
Hjá Formula vita vit, at KT og burðardygd ikki eru mótafyribrigdi – men lívsneyðugir partar av einum framtíðartryggjaðum samfelagi. Okkara missión er at skapa KT-loysnir, ið eru effektivar, etiskar og umhvørvisvinarligar – og at gera hetta saman við kundum og samstarvspartnarum, sum hava somu virðir.

# Formula | Samfelagstilvit | 2025

Við hesi frágreiðingini um samfelagstilvit seta vit orð á eina ábyrgd, sum altíð hevur verið partur av okkara gerandisdegi. Vit hava altíð trúð upp á, at KT ikki bara handlar um tøkni – men um menniskju, álit og framburð.

Vit vilja vera ein fyritøka, sum flytur seg — og sum flytur samfelagið við fram á leið.

Vit takka starvsfólkum, kundum og samstarvsfeløgum.

Formula - Tín tryggi KT-veitari




Formula | Óðinshædd 2 | www.formula.fo | 34 40 00